# SAMSTARVSRIKIN INNOVATIÓN

Føroyskar innovatiónssøgur úr almenna geiranum

LANDSFYRISITINGIN

**Samstarvsrikin innovatión**
-Føroyskar innovatiónssøgur úr almenna geiranum

**Høvundar:** Bára Akselsdóttir Haraldsen og Jóna Ólavsdóttir Dalsgarð
**Verkætlanarleiðsla:** Birita Nolsø
**Grafisk uppsetan:** KREA
**Prent:** Føroyaprent

Løgmansskrivstovan 2017
www.innovation.fo

Bóklingurin er framleiddur í sambandi við felags starvsfólkadag 2017

*Arbeiðið saman! Nýggir bygnaðir og nýggj samstørv í organisatiónini styrkja verksetan og amboð til at arbeiða við innovatión. Samstundis verða kunning og tilfeingi gagnnýtt til fulnar og váðin verður býttur sundur millum partarnar*

OECD, 2017

# INNIHALDSYVIRLIT


Fororð ........ 6

Samstarvsrikin innovatión ........ 9

Hví innovatión? ........ 10

Hví samstarvsrikna innovatión? ........ 11

Borgararikin innovatión ........ 13

Býarfesti ........ 15

Starvsfólkarikin innovatión ........ 17

Grafisk fasilitering í Lógartænastuni ........ 19

Sosial innovatión ........ 21

Dugni ........ 23

Samskapan ........ 25

Tann góða tilgongdin ........ 27

Alment-privat samstarv ........ 29

Google Sheep View ........ 31

At arbeiða ítøkiligt við innovatión ........ 33

Hvussu kunnu vit menna ein nýskapandi hugsanarhátt í almenna geiranum í Føroyum? ........ 34

Fimm atlit ........ 35

Dømi um ítøkiligan arbeiðshátt ........ 36

Innovation.fo ........ 37

Bókmentir ........ 38

# FORORÐ

Eitt av fýra virðum hjá landsfyrisitingini er ”Vit bróta slóð”, og í hesum sambandi hevur landsfyrisitingin seinastu árini varpað ljós á almenna innovatión. Í februar mánaði 2017 varð farið undir verkætlanina Vit bróta slóð í sambandi við starvslestrartíðina hjá okkum, Báru Akselsdóttir Haraldsen og Jónu Ólavsdóttir Dalsgarð, á Løgmansskrivstovuni. Eitt av endamálunum við verkætlanini var at varpa ljós á innovatión í almenna geiranum í Føroyum. Í hesum sambandi vórðu innovatiónssøgur frá borgarum, stovnum og ráðum savnaðar saman, og nakrar teirra hava fingið rúm í hesum bóklingi. Ætlanin er at vísa á fjølbroytni í almennari innovatión í Føroyum og leggja upp til kjak um, hvussu vit, tvørtur um geirar, stovnar og ráð, kunnu fremja samstarvsrikna innovatión.

Innovatión er ein partur av arbeiðinum í landsfyrisitingini. Hetta vísir millum annað ein kanning av almennari innovatión í Føroyum, sum staðfestir, at 91% av organisatiónunum undir landsfyrisitingini hava framt innovatión árini 2011-2016. Hetta er jaliga síðan av søguni. Neiliga síðan er tann, at vit ikki vita nokk um tær innovatiónir, ið verða framdar. Er talan um tilvitaða innovatión? Verður tilfeingið nýtt til fulnar? Fær borgarin nakað burturúr? Ella kunnu vit siga, at vit hava eina sterka innovatiónsmentan í tí almenna í Føroyum?

Nakað, sum kann ávirka hvørjir hugsunarhættir forma okkara arbeiðspláss og samfelag, er, hvørjum stýringarhátti støði verður tikið í. Serfrøðingar í almennari fyrisiting vilja vera við, at stýringarhátturin New Public Governance[1] gevur burðardyggastu úrslitini. Frymilin fyri New Public Governance verður lýstur soleiðis:

$$\textit{Burðardygg úrslit} = \frac{\textit{samstarv millum organisatiónir}}{\textit{leitan eftir innovativum loysnum}}$$

Við øðrum orðum tørvar okkum samstarvsrikna innovatión í tí almenna, um vit ynskja burðardygg úrslit. Tað er gott, at vit fremja nýskapandi loysnir, men loysa vit avbjóðingarnar saman við viðkomandi samstarvspørtum, kunnu loysnirnar møguliga gerast enn betri. Tá ið vit bjóða hvørjum øðrum inn at síggja avbjóðingar og loysnir við nýggjum eygum, stimbra vit innovatión. Tí gløgt er gestsins eyga.

[1] New Public Governance er ein stýringarháttur í tí almenna, har organisatiónir samstarva um felags avbjóðingar í bólkum, felagsskapum ella í felags innovatiónshøpi. Stýringarhátturin New Public Governance er mettur at vera avloysarin til stýringarháttin New Public Management, sum hevur sett dám á almennar fyrisitingar í vesturheiminum síðan áttatiárini.

Við hesum bóklingi ynskja vit at vísa á ymisk dømi um samstarvsrikna innovatión í Føroyum. Vit ynskja at vísa, hvussu samstarvsrikin innovatión kann skipast, og at veita íblástur og ráðgeving um innovatión.
Vit vóna, at tú fært nyttu burturúr teimum einstøku dømunum, men eisini hyggur tvørtur um ymisku dømini, soleiðis at tú kanst uppdaga tey eyðkenni, sum lýsa innovativu verkætlanirnar í Føroyum.

Vit vilja takka øllum teimum, ið hava verið við í arbeiðinum av hesum bóklingi, og ein serlig tøkk til tykkum, ið hava gjørt virðismiklar viðmerkingar til arbeiðið.

Bára Akselsdóttir Haraldsen og Jóna Ólavsdóttir Dalsgarð,
starvslesandi á Løgmansskrivstovuni,

Tinganes, mai 2017

*“Innovatión er at skapa nakað nýtt, sum ger mun”*

# SAMSTARVSRIKIN INNOVATIÓN

# HVÍ INNOVATIÓN?

Avbjóðingarnar í dagsins samfelag eru av einum vavi, sum vit ikki hava sæð áður, og hesin veruleiki setir trýst á okkara skipanir og á stjórnir kring allan heim. Samstundis sum bæði menniskjaliga og fíggjarliga **tilfeingið er og verður avmarkað, væntar borgarin sær alsamt meira** av tí almenna.
**Økt alheimsgerð** er eisini ein orsøk til økta eftirspurningin eftir almennari innovatión. Føroyar eru í støðugari kapping við umheimin bæði viðvíkjandi kappingarføri í vinnuni og viðvíkjandi fólkatilflyting.
Sonevndir **tvørligir trupulleikar** gerast støðugt fleiri í tali, og hesir trupulleikar verða ikki loystir við øktum tilfeingi einans.

**Tvørligir trupulleikar -** *"wicked problems"*
Ein tvørligur trupulleiki er ein trupulleiki, ið er torførur ella ómøguligur at loysa, orsakað av ófullfíggjaðum, sjálvmótsigandi og skiftandi krøvum, sum ofta eru torfør at fáa eyga á. Tað ber ikki til at koma við eini partleysari meting av, nær trupulleikin er loystur, og tað er ringt at eftirmeta, hvørji úrslit standast av tí arbeiði, ið er lagt í at loysa trupulleikan.

*Dømi: Urbanisering, umhvørvisavbjóðingar og flóttafólkatilflyting*



# HVÍ SAMSTARVSRIKNA INNOVATIÓN?

Ofta sprettur innovatión úr samanrenningini millum ymsar partar, ið hittast, deila síni hugskot, og á hendan hátt vinna nýggjar hugsanir fram og fáa undirtøku. Vit hugsa klókari saman. Politikarar, granskarar, vinnulív, starvsfólk, brúkarar og borgarar kunnu á hvør sín hátt geva sítt íkast.

**Fyrimunirnir við at samstarva í innovatiónstilgongdum eru fleiri:**

- Greiningin av trupulleikum og avbjóðingum verður betri, tá ið ymiskar royndir, vitan og sjónarmið eru við í arbeiðnum.

- Menningin av nýggjum hugskotum styrkist, tá ið ymiskir partar "órógva" hugsanirnar hjá hvør øðrum.

- Tað verður tryggari at velja millum hugskotini, tá ið fleiri partar, við ymiskum sjónarmiðum, kunnu meta um vinning og váða í einstøku hugskotunum.

- Verksetanin verður betri, tá ið tilfeingið verður samskipað, og felags ognarkensla verður skapað við luttøku og samstarvi.

- Spjaðingin verður tryggjað gjøgnum netverksarbeiði, tí luttakararnir gerast umboð fyri innovativu loysnunum.

> ***Innovatión skal ikki gerast eitt mál í sær sjálvum, men kann vera ein háttur at náa stevnumiðum og soleiðis skapa meirvirði fyri samfelagið***
>
> Eva Sørensen og Jacob Torfing, Roskilde Universitet

# BORGARARIKIN INNOVATIÓN

# BORGARARIKIN INNOVATIÓN

Seinastu árini er tað vorðið alsamt meiri vanligt at taka brúkarar og borgarar við í almennar innovatiónstilgongdir. Almenni geirin hevur sannað, at borgarin hevur vitan, hugskot og tilfeingi, sum kunnu verða øllum samfelagnum at gagni. Tað eru fleiri dømi um borgararikna innovatión í tí almenna í Føroyum, og ynskiligt er, at enn fleiri síggja virðið í hesum.

Nyttan av borgarariknari innovatión er ymisk. Tað velst um í hvønn mun borgarin er við í tilgongdini. Talan kann vera um, at borgarin bert er tikin við uppá ráð, um innovatiónsverkætlanir, har borgarin bæði eigur hugskot og part av ábyrgdini, og alt har ímillum.

Ein máti at gagnnýta tilfeingið hjá borgarunum er, at tað almenna eggjar til og fíggjar innovatión. Eitt dømi um hetta er verkætlanin Býarfesti, sum er samskipað av borgarum og fíggjað av Tórshavnar kommunu. Tað, at lata stuðul til góð hugskot, eggjar borgarum til at nýta hugflogið, og møguleikin fyri at fáa fígging til bestu hugskotini tryggjar verksetan.



# BÝARFESTI

Býarfesti er ikki longur bara ein verkætlan á pappírinum, men fyrireikingin og fleiri mánaðir av ráðlegging vísa seg nú í fysiskum skapi. Soleiðis skrivar Birgith Lassen, samskipari av verkætlanini Býarfesti, á bloggi sínum byarfesti.fo.

11. mai 2016 fekk verkætlanin Býarfesti handað umhvørvisstuðul á 100.000 krónur frá Tórshavnar kommunu. Endamálið við verkætlanini var at eggja býarborgarum til at velta egið grønmeti, og tað eru tey bæði, Birgith Lassen og Rólant Dam, sum samskipa verkætlanina.

Birgith og Rólant vóru júst flutt aftur til Føroya úr Aarhus. Úr Aarhus kendu tey til "urban farming", og tá ið møguleikin fyri at søkja um umhvørvisstuðul frá Tórshavnar kommunu vísti seg, kom íblásturin til at byrja eina verkætlan í Føroyum.

- Tað hevði ikki borið til at farið undir hesa verkætlan, um vit ikki høvdu fingið umhvørvisstuðul frá Tórshavnar kommunu, greiðir Birgith frá.

Verkætlanin er gjørd í samstarvi við kommununa. Birgith og Rólant eiga hugskot og samskipan, meðan kommunan hevur syrgt fyri fíggingini. Stuðulin frá kommununi var avgerandi fyri, at hugskotið kundi setast í verk, og hugskotið frá borgarunum skapar virði fyri aðrar borgarar í kommununi. Kommunan væntar, at hendan verkætlanin fer at skapa lív í býnum, samstundis sum tey luttakandi í verkæltanini og aðrir borgarar fáa økta vitan og áhuga fyri at velta egið grønmeti.

# STARVSFÓLKARIKIN INNOVATIÓN

# STARVSFÓLKARIKIN INNOVATIÓN

Tá ið nýggjar avbjóðingar skulu loysast, er tað ofta leiðslan, sum leggur høvdini í blot. Tí verður vitanin, sum starvsfólkini hava frá sínum gerandisarbeiði, ikki gagnnýtt til fulnar. Starvsfólkarikin innovatión er, tá ið leiðslan velur at bjóða starvsfólkunum við, tá ið nýggjar loysnir skulu finnast. Tað er ymiskt, í hvussu stóran mun starvsfólkini eru við, men tað avgerandi er, at innovatiónin tekur støði í hugskotum, vitan og førleikum hjá starvsfólkunum.

Úrslitið, av at taka starvsfólkini við, verður ein breiðari lýsing av avbjóðingunum og starvsfólkini fáa størri ognarkenslu. Ognarkenslan er við til at minka um mótstøðu og betra verksetanina av teimum tiltøkum, sum møguliga skulu setast í verk. Tá ið starvsfólk miðvíst og javnan verða tikin við í innovatiónsarbeiði, økir hetta samstundis um nøgdsemið millum starvsfólkini, og ein innovatiónsmentan í organisatiónini verður ment.

Tað finnast nógv dømi um starvsfólkarikna innovatión í Føroyum. Grafisk fasilitering, ið var nýtt í Lógartænastuni á Løgmanskrivstovuni, er eitt gott dømi um, hvussu eitt einfalt og øðrvísi hugskot frá einum starvsfólki, kann verða til stóra gleði fyri bæði starvsfólk og borgarar, um leiðslan torir at royna nýggjar leiðir.



# GRAFISK FASILITERING Í LÓGARTÆNASTUNI

Við íblástri frá einum skeiði í grafiskari fasilitering í Stjórnarskúlanum spratt hugskotið um at nýta hesa tilgongdina í sambandi við hoyringar í Lógartænastuni á Løgmansskrivstovuni.

- Kanska mann hevði hug at flenna eitt sindur at hesum á skeiðnum, tí 'kunnu vit brúka hetta til alvorligt lógararbeiði?' greiðir Nella Festirstein, deildarstjóri á Lógartænastuni, frá.

Men tá ið Lógartænastan seinni skuldi undir at dagføra revsilógina, fekk eitt starvsfólk tað hugskotið at brúka grafiska fasilitering til at greiða viðkomandi samfelagsbólkum frá hesum torskilda og viðkvæma máli. Hugskotið kom frá einum spurningi um, hvussu ein kann møta kenslunum hjá fólki í einum máli, sum er so kensluleyst og grundað á sannroyndir, sum løgfrøði ofta kann vera.

- Tá var tað, at hugskotið kom, at kanska vit kunnu tekna tað, sigur Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, sum átti hugskotið.

Gudrun greiðir frá, at tað var ein verulig vau-uppliving at nýta grafiska fasilitering til at greiða frá løgfrøðiliga arbeiðinum.

- Nú skiltu tey tað, søgdu tey. Tað var sum um, at tey knappliga sóu ljósið, tá tey sóu tað teknað soleiðis, greiðir Gudrun frá.

Í Lógartænastuni kenna starvsfólkini seg vælkomin til deildarstjóran við nýggjum hugskotum, og er undirtøka fyri at seta hugskotini í verk, verður samstarvað um hetta. Tí eru starvsfólkini ikki bangin fyri at hugsa nýtt og at royna nýggjar arbeiðshættir - eisini hóast talan er um alvorligt lógararbeiði.

# SOSIAL INNOVATIÓN

# SOSIAL INNOVATIÓN

Sosial innovatión er, tá ið nýggj hugskot verða sett í verk, sum miðvíst nøkta ein samfelagsligan tørv betri enn áður, samstundis sum sosial sambond og samstørv verða til.

Meðan almenn innovatión snýr seg um innovatión í almenna geiranum, verður sosial innovatión innan tað almenna skapað í einum samstarvi millum almenna og sjálvbodna geiran - og av og á eisini privata geiran. Við at nýta styrkir og tilfeingi hjá hvør øðrum, samstarva geirarnir um at røkka einum felags endamáli. Tað kunnu vera einstaklingar, áhugafeløg ella onnur, ið brenna fyri at hjálpa ávísum samfelagsbólkum. Eisini kunnu tað vera fyritøkur, sum vísa samfelagsanda og ynskja at samstarva við almenna geiran um at loysa avbjóðingar í samfelagnum.

**Treytirnar, fyri at ein verkætlan kann kallast sosial innovatión, eru:**

- At ein sosialur tørvur verður nøktaður við nýskapandi, betri loysnum, og
- At loysnin er framd í einum samstarvi millum almenna og sjálvbodna geiran og í summum førum eisini privata geiran.

Ofta sæst hetta slagið av innovatión í sambandi við at skapa nýggjar møguleikar fyri at fáa fólk við vinnutarni aftur á arbeiðsmarknaðin. Innovatiónin sprettur ofta burtur úr einum hugskoti frá einum borgara ella samfelagsbólki, sum sær ein tørv, og síðani vendir sær til almenna geiran við ynski um samstarv. Eitt dømi um hetta úr Føroyum er verksetanin av sjálvsognarstovninum Dugna.



# DUGNI

Endurbúgvingarvirksemið hjá Dugna snýr seg í høvuðsheitum um at hjálpa fólki, ið hava vinnutarn, við at varðveita ella fáa arbeiði. Eisini arbeiða starvsfólk á Dugna við at umskúla fólk og geva hesum møguleika at royna síni arbeiðsevni. Dugni er í dag ein sjálvsognarstovnur undir Almannamálaráðnum, men byrjaði sum eitt hugskot hjá einum borgara, ið leitaði sær samstarv í privata og almenna geiranum fyri at gera hugskot til veruleika.

Karolina Petersen, sála, byrjaði sjálvboðin endurbúgvingararbeiðið fyri avlamisfólk á heysti 1955 í samstarvi við Vanlukkutryggingarráðið. Í høvuðsheitum var virksemið at gera kurvar, bustir, skreytlutir og arbeiðshandskar. Seinni varð hetta víðkað til eisini at verða skúli fyri fólk við avbjóðingum.

- Eldsálin aftan fyri virksemið hevur sæð nógvar møguleikar í ymiskum virksemi, sum til dømis at samstarva við táverandi Frímerkjadeild, sigur Hedvig Johansdóttir, stjóri á Dugna.

Umframt at skipa fyri ymiskum arbeiðsgevandi virksemi innanhýsis, so sum verkstaðir og handlar á Hjalla og á Kambsdali, hevur Dugni eisini søguliga havt nógv samstarv við vinnuna og hevur tað enn í dag. Í samstarvi við privatar arbeiðsgevarar sleppa fólk at endurbúgva seg í tillagaðum starvi. Endamálið við hesum arbeiði er at skapa arbeiðsvirksemi fyri brúkararnar, samstundis sum hetta stimbrar sosial sambond og samstørv

Dugni samstarvar við Almannaverkið um ymiskar veitingar, men leggur eisini stóran dent á týdningin av at hava brúkaran við í arbeiðinum.

- ’Hvat er tað, sum tú vilt arbeiða fram ímóti?’ spyrja vit. Og tað er ordiliga týdningarmikið, greiðir Hedvig Johansdóttir frá og leggur afturat, at samstarvið stimbrar støðugari innovatión.

# SAMSKAPAN

## SAMSKAPAN

Samskapan er, tá ið almennir og ikki-almennir partar, til dømis almennar organisatiónir og brúkarar, samstarva um at skapa nýggjar loysnir til felags avbjóðingar. Samskapan er tí at loysa uppgávur saman og at samskifta við brúkaran í allari tilgongdini. Um brúkarin verður tikin við so tíðliga sum møguligt, fáa allir partar møguleika fyri at koma við sínum íkasti. Endamálið við samskapan er at skilja støðuna og avbjóðingarnar hjá brúkaranum og í felagsskapi at snikka eina loysn til, sum loysir hesar avbjóðingar.

> *Vit skulu fara frá at gera loysnir fyri borgaran til at gera loysnir saman við borgaranum*

Tá ið vit tosa um samskapan, er tað ikki nokk, at brúkarin er tikin við uppá ráð. Allir partar skulu lata munandi tilfeingi, so sum tíð og hugskot, og brúkarin skal vera ein virkin leikari í samstarvinum. Tá ið brúkarin er við til at skapa nýggjar loysnir saman við almenna veitaranum, økir hetta um ognarkensluna hjá brúkaranum, sum er til fyrimunar fyri allar partar.

Tað finnast fleiri dømi um samskapan í Føroyum, eitt av hesum er “Tann góða tilgongdin”.



# TANN GÓÐA TILGONGDIN

Foreldur at børnum við autismu høvdu leingi gjørt vart við sína ónøgd við vantandi samskipan av almennu tænastunum. Tí vendu tey sær til Almannamálaráðið við ynski um at fáa eina tænastu, sum var betur skipað. Almannamálaráðið tók síðani stig til verkætlanina við heitinum "Tann góða tilgongdin".

Samstarv varð skipað millum Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, Kommunufelagið og Autismufelagið, umframt allar viðkomandi stovnar á hesum økjum. Umboð fyri Autismufelagið vóru við í allari tilgongdini.

- Tey vita best. Tað eru tey, sum kenna, hvussu tað er, at vera brúkari av almennu skipanini, og kenna trupulleikan av vantandi samskipan millum ymsu stovnarnar. Tað hevði positiva ávirkan, at foreldur vóru við í arbeiðinum, sigur Eyðvør Mortensen, samskipari.

Partarnir funnu í felag fram til ein leist, sum skuldi betra um almennu tænasturnar hjá familjum við børnum við autismu. Harafturat heldur Eyðvør Mortensen, at samstarvið í sjálvum sær var ein eykavinningur.

- Vit læra hvønn annan at kenna, og tað skapar eitt nógv betri samstarv, sum eisini hevur ávirkað samstarv í øðrum høpi enn viðvíkjandi børnum við autismu, greiðir Eyðvør frá.

Eitt ár eftir, at leisturin varð verksettur, var fundur við Autismufelagið. Sambært Eyðvør hava afturmeldingarnar sum heild verið góðar. Hon leggur afturat, at tað er umráðandi ikki at undirmeta samskipanarpartin, tí at tess fleiri partar eru við í samstarvinum, tess meiri arbeiði liggur í at samskipa verkætlanina.

# ALMENT-PRIVAT SAMSTARV

# ALMENT-PRIVAT SAMSTARV

Ein háttur at fremja samstarvsrikna innovatión er, at almenni geirin samstarvar við privata geiran. Í eini almennari-privatari innovatiónsverkætlan arbeiða luttakararnir saman um at menna nýggjar innovativar loysnir, sum loysa felags avbjóðingar.

Eitt samstarv við tað privata ger tað møguligt fyri almennar organisatiónir at royna ymiskt, sum annars ikki hevði verið møguligt. Aðrar lógir og reglur eru galdandi fyri almenn partafeløg og/ella privatar fyritøkur/felagsskapir, og tí er møguligt at gera ymiskar royndir í einum samstarvi við privata geiran, sum ikki høvdu borið til í tí almenna.

Eitt dømi um eina verkætlan, sum er framd í einum samstarvi millum lutvíst almennar og privatar organisatiónir er Google Sheep View. Í felag hava partarnir arbeitt fyri at verkseta eitt hugskot, sum tænir einum felags endamáli.



# GOOGLE SHEEP VIEW

Visit Faroe Islands hevur til endamáls at fáa fleiri ferðafólk at vitja Føroyar. Visjónin er, at ferðavinnan kann verða ein nýggj basisvinna fyri landsbúskapin. Hjá Atlantic Airways eru tey eisini áhugað í at fáa fleiri ferðafólk til Føroya til tess at økja um ferðaseðlasøluna. Í samstarvi við privatar samskiftisfyritøkur í Føroyum og uttanlands varð tí farið undir átakið Google Sheep View.

Visit Faroe Islands hevði eitt hugskot um eina lýsingarherferð, sum skuldi fáa Føroyar á heimskortið, og av tí at Google í dag er sammerkt við heimskortið, ynsktu tey, at Google skuldi vera ein partur av átakinum. Við hesum útgangsstøði vendu Visit Faroe Islands sær til privatu lýsingafyritøkurnar Sansir og Liquidminds, sum mentu eitt hugskot um at seta filmstól á seyð. Visit Faroe Islands vendu sær síðani til Atlantic Airways við hesum hugskotinum, og í felag mentu tey lidna brandið *Google Sheep View*. Men fyri at hugskotið kundi gerast veruleiki, skuldu partarnir seta eina millión krónur hvør í váða.

Níggju av tíggju leiðarum siga nei í sovorðnum førum, tí tað er for ósikkurt. Men eg haldi tað, at um mann vil náa óvanliga høgum úrslitum, so má mann eisini viðhvørt tora at taka óvanliga høgar risikoir, sigur Guðrið Højgaard, stjóri á Visit Faroe Islands.

Guðrið Højgaard er sera takksom fyri, at Atlantic Airways eisini tordi at taka hendan váðan á seg, tí tað var eingin vissa fyri, at verkætlanin fór at geva úrslit. Men í dag síggja partarnir vinningin av at hava váðað í felag. Hotellini eru bókað nógv fyrr í ár samanborið við undanfarin ár, og virðislønirnar koma í stríðum streymum, sum eisini gevur Føroyum eyka umrøðu.

Sum við øllum toymum og prosjektum, so handlar tað um, at hvør gevur sítt íkast. Vit høvdu okkara upp- og niðurtúrar í samstarvinum, men vit føldu, at vit máttu gjøgnumføra prosjektið. Tú fert út á ótrygga mark, men tú fyrireikar teg so væl sum møguligt, sigur Guðrið Højgaard.

# AT ARBEIÐA ÍTØKILIGT VIÐ INNOVATIÓN

# HVUSSU KUNNU VIT MENNA EIN NÝSKAPANDI HUGSANARHÁTT Í ALMENNA GEIRANUM Í FØROYUM?

Innovatión kemur ikki burtur úr ongum, men krevur, at vit eru tilvitað um hetta og samskipa verkætlanirnar skynsamt.

**Yvirskipað eru trý eyðkenni, ið vísa seg í innovativum organisatiónum:**

- Hava greiða leiðslu og strategiska kós
- Hava eina innovatiónsmentan
- Hava samband tvørtur um organisatiónina og uttanhýsis samband

Tað eru fleiri hættir at arbeiða við innovatión. Innovatión í gerandisdegnum kann rótfestast í eini organisatión við at seta greið mál fyri nýskaparnararbeiði. Ein innovatiónsstrategi kann vera ein háttur at menna innovatiónsførleikarnar í eini organisatión til tess at megna at loysa framtíðaravbjóðingar. Tað er umráðandi, at ítøkiligar gerðir og virksemi fylgja málunum, tá ið ætlanir verða lagdar. Ábyrgd verður síðani løgd út til viðkomandi persónar, soleiðis at málini kunnu gerast veruleiki.

> ***Vansin við samstarvi, halda summi, er, at so má ein geva burtur ein part av hugskotinum, men hinvegin er tað betri at eiga ein part av nøkrum enn at eiga alt av ongum***
>
> Bjartur Nolsøe, Íverksetarahúsið

# FIMM ATLIT

Tað vísa seg serliga at vera fimm viðurskifti, ið ein leiðsla eigur at taka atlit at, fyri at fáa sum mest burturúr innovatiónstilgongdum.



# DØMI UM ÍTØKILIGAN ARBEIÐSHÁTT

Tað finst ein ørgrynna av arbeiðshættum, ið stuðla undir innovatión og innovativar tilgongdir.
Innovatiónsspurningurin er ein ítøkiligur arbeiðsháttur í nýskapanararbeiði. Í stuttum snýr tað seg um at seta ein spurning, sum letur upp fyri nýggjum møguleikum, heldur enn at seta mál um meira av tí sama.

**Innovatiónsspurningurin eigur:**

- at rúma eini visjón
- at vera ein avbjóðing at svara
- at vera lættur at skilja og at vera kveikjandi í mun til víðari arbeiði

**Góð ráð, tá ið arbeitt verður við innovatiónsspurninginum**

- Gevið tykkum góða tíð til at arbeiða við spurninginum. Tað er torførari, enn tú heldur, og tað kann taka vikur ella mánaðir, áðrenn tú ert heilt liðug/ur at orða rætta spurningin.
- Gerið tykkum greitt, hvussu og hvør skal arbeiða víðari við hugskotunum, sum koma burturúr innovatiónsspurninginum.
- Innovatiónsspurningurin skal ikki vera ein neyðsemja. Er ósemja um, hvussu spurningurin skal orðast, gerið so heldur tveir spurningar.
- Tað er sera umráðandi, at leiðslan stuðlar arbeiðinum í allari tilgongdini.

**Nær er talan um ein innovatiónsspurning?**

| *Dømi um innovatiónsspurningar* | *Dømi um ikki-innovatiónsspurningar* |
|---|---|
| Hvussu kann tað almenna veita sjúkrahúsveiting uttan at hava sjúkrahús ? | Hvussu kunnu vit sleppa av við stirvnu leiðsluna ? |
| Hvussu kunnu vit fáa starvsfólk at leypa “1. starvsár” um og fara beinleiðis til “2. starvsár” ? | Hvussu halda vit fast í næmingunum ? |
| Hvussu fáa vit borgarar at vilja hjálpa til ? | Hvussu fáa vit starvsfólkini at arbeiða meira ? |

## INNOVATION.FO

Á heimasíðuni innovation.fo kanst tú lesa meira um innovatiónsspurningin og aðrar ítøkiligar arbeiðshættir, har tú eisini finnur:

- Nýggjastu vitan um almenna innovatión, bæði úr Føroyum og umheiminum.

- Bloggar frá ymiskum persónum í føroyska landsslagnum, sum á ein ella annan hátt fáast við almenna innovatión.

- Ítøkiligar arbeiðshættir og amboð, sum tú kanst nýta í tínum arbeiði við innovatión. Til dømis ein spjaðingarvegleiðing, amboð til innovatión í gerandisdegnum og ein vegleiðing til eftirmeting av innovatións-verkætlanum.

“ ***Gløgt er gestsins eyga*** ”

# BÓKMENTIR


Aagaard, P.; Sørensen, E.; Torfing, J. (red.) (2014) *Samarbejdsdrevet innovation i praksis*, 1. udgave 1.oplag, Jurist- og Økonomforbundets Forlag

Arge, B.; Dalsgarð, J. Ó.; Haraldsen, B. A. (2016) *Innovationsspredning mellem offentlige organisationer på Færøerne.* Fæst eftir umbøn við at venda sær til innovation@tinganes.fo

Digmann, A.; Jensen, K.E.; Jensen, J.P. (2012) *Vi er på vej - offentlig innovation 2.0*, p.47-65, 1.udgave, 2.oplag, Gyldendal

FTF (2007) *Medarbejderdrevet innovation*, Rambøll Management

Greve, C. (2012) *NPM eller/og NPG - Hvad kan de bruges til?*

Moulaert, F. (2009): *Social Innovation: Institutionally Embedded, Territorially* (Re)Produced. In: MacCallum, D. et al. (eds.): Social Innovation and Territorial Development. Cheltenham: Edward Elgar. kap. 1. s. 13-24

OECD (2017) *Fostering Innovation in the Public Sector*, OECD Publishing, Paris. http://dx.doi.org/10.1787/9789264270879-en

Sørensen, E.; Torfing, J. (2011) *Samarbejdsdrevet innovation i den offentlige sektor* 1. udgave, 2.oplag, Jurist- og Økonomforbundets Forlag

Voorberg, W. H., Bekkers, V. J. J. M., & Tummers, L. G. (2014). *A Systematic Review of Co-Creation and Co-Production: Embarking on the social innovation journey.* Public Management Review, mai 31, 2, 1–25

LANDSFYRISITINGIN